# Framsøkin umhvørvispolitikkur - eisini á Fólkatingi



Val X

ANNIKA OLSEN
Fólkatingsvalevni
Fólkafloksins

**Føroyar eru í hesum døgum kosnar heimsins bestu oyggjar sum óspilt ferðamannaland. Enn er tó langt á mál, áðrenn føroyski umhvørvispolitikkurin kann kjósast sum heimsins besti. Eg vil tryggja, at føroyski umhvørvispolitikkurin verður raðfestur ovarlaga – eisini á Fólkatingi**

Sum fiskivinnu- og ferðamannaland er tað umráðandi fyri Føroyar at hava og varðveita eitt reint og ríkt umhvørvi. Fyri fiskivinnuna hevur tað alstóran týdning, at dálking ikki elvir til vánalig livikor hjá sjótilfeinginum ella til minkandi virði fyri vøruna. Fyri ferðavinnuna hevur tað týdning, at landið eisini í framtíðini kann lýsast sum reint og óspilt, bæði á sjógvi, á landi og í luftini. Fyri øll, sum búleikast her á oyggjunum, hevur tað týdning, at náttúran og umhvørvið eisini í framtíðini kann vera varandi vakur grundarsteinur at byggja á og trívast í.

Higartil má tað tó staðfestast, at hvørki løgtingið ella landsstýrið hava megnað at broyta skeivu kósina í føroyska umhvørvispolitikkinum, hvørki herheima ella á altjóða pallinum. Dálking ferðast um landamørk, og tí ber ikki til at lata standa til og onki gera. Tíðin er eisin farin frá bert at gera tað, sum altjóða samfelagið tvingar okkum at gera. Neyðugt er at vera framsøkin – eisini á Fólkatingi.

Nútímans náttúru- og umhvørvispolitikkur byggir fyri stóran part á altjóða sáttmálar og millumlanda avtalur, sum eru samtyktar í ST, ES og øðrum samveldisstovnum. Tað er eisini har, at altjóða sáttmálarnir og avtalurnar verða dagførdar. Óansæð ríkisrættarligu støðu Føroya, so hevur tað ikki verið siðvenja hjá landsstýrinum ella umsitingini at taka virknan lut í tí fyrireikandi arbeiðinum, møguliga tí tað kostar ov nógv í tíð, embætisfólkum og pengum. Hetta er helst ein av orsøkunum til, at so langt enn er á mál, til Føroyar innan lóggávu, umsiting, gransking og í verjandi tiltøkum kunnu kallast at hava ein framsøknan umhvørvispolitikk.

Eg vil arbeiða fyri, at umhvørvið verður raðfest ovarlaga, so tað politiskt og umsitingarliga verður gjørligt hjá føroyingum at seta fingramerki á framtíðar altjóða náttúru- og umhvørvispolitikk. At tryggja føroyingum luttøku í fyrireikandi arbeiðinum á altjóða pallinum longu tíðliga í tilgongdini, ger okkum betur før fyri at taka røttu avgerðirnar til røttu tíð og soleiðis føra ein framsøknan umhvørvispolitikk - eisini á Fólkatingi.

www.annikaolsen.net

# Nýggj byrjan: Burtur við konfrontatiónini – fram við loysnunum

**Tað ber til at vinna Føroyum eina nýggja skipan, har vit hava veruligt uttanríkispolitiskt virkisføri. Við at seta politiskan dialog í fremstu røð og leggja konfrontatiónir og gerðarloysi afturum ber til skifta heimastýrislógina út við nýggjan sáttmála, ið byggir á Frælsan Felagsskap**



Val X

JOHN JOHANNESSEN
www.john.fo

Fyri at taka okkum fram í føroyskum sjálvstýri er umráðandi, at hetta verður eitt felags mál fyri føroyingar. Vit eru øll samd um, at okkum tørvar størri virkisføri og avgerðarrætt á uttanríkispolitiska økinum.

Serliga aktuelt er hetta, nú Danmark leggur alt meira av valdinum til ES at umsita. Føroyar eru ikki partur av ES, tí meiriluti er framvegis ímóti hesum í Føroyum. Tí er tað marghháttligt, at okkara uttanríkispolitikkur skal verða stýrdur av ES umvegis Danmark.

Vit eru noydd at síggja hendan trupulleika í eyguni og gera nakað við hann. Vit kunnu ikki lata gerðarloysi vera okkara vørumerki. Men vit skulu ikki leypa í konfrontatión við danir um hetta. Tí tað loysir ongar trupulleikar. Tað er langt síðani prógvað.

Við mínum sessi á Fólkatingi vil eg virka fyri, at vit fáa eina heilt nýggja skipan við sáttmála, ið tryggjar Føroyum sjálvstøðugt uttanríkispolitiskt vald.

Tað er ein avbjóðing áhaldandi at vísa á, at samstarvið við Danmark bert kann virka, tá tað er grundað á eina felags fatan um, at samstarvið er millum javnsettar partar. Og at ikki gomul jura, men ein felags vilji at økja rásarúmið hjá øllum pørtum er fortreyt og vegur í samstarvinum.

**Útgingin heimastýrislóg**
Verandi heimastýrislóg er farin um seinasta søludag. Vit frískaðu hana upp við nýggju yvirtøkulógini, men kortini er hon ikki tíðarhóskandi longur.

Tað vóru grundleggjandi broytingar gjørdar í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, tá Heimastýrislógin kom fyri skjótt 60 árum síðani. Føroyar fingu lóggávu- og fyrisitingarvald, sum saman við avgerandi stuðuli frá ríkismyndugleikunum hava staðið fyri stórum framstigum í menningini av einum føroyskum vælferðarsamfelag.

Tá var hetta eitt nýbrot í samvinnu millum lond. Nýbrot, sum juristar søgdu var ómøguligt, men sum við víðskygni og treiskni bleiv veruleiki og sum nú í skjótt 60 ár hevur verið karmur um samvinnuna millum Føroyar og Danmark.

Nú eru Føroyar eitt nýmótans vælferðarsamfelag, sum má hava størri uttanríkispolitiskt virkisføri og harvið marknaðaratgongd, skal tað framhaldandi mennast. Men júst á hesum økjum setir heimastýrislógin ov stórar avmarkingar.

**Nýggj byrjan**
Søguliga hevur Javnaðarflokkurin altíð staðið fyri teimum framstigum, sum eru tikin á sjálvstýrisleið. Tað sum hevur eyðkent avgerðirnar er, at tær eru tiknar, tá tær hava verið neyðugar fyri framhaldandi menning av samfelagnum.

Nú er ein nýggj byrjan neyðug. Vit skulu gjøgnum virðiligan og upplýsandi dialog semjast við danir um ein sáttmála ímillum londini bæði, har vit viðurkenna hvørt annað sum javnbjóðis tjóðir í einum frælsum felagsskapi.

Um vit í nýggja felagsskapinum seta okkum uttan fyri donsku grundlógina, krevur hetta, at vit ítøkiliga fara í gongd aftur at arbeiða við føroysku stjórnarlógini. Tað vil siga, at stjórnarskipanarnevndin aftur skal til arbeiðis.

**Í stjórnarlógini skal greitt ásetast:**
hvussu politiska valdið er skipað innanlands og úteftir
hvussu landið er skipað fyrisitingarliga og rættarliga
hvørji rættindi og hvørjar skyldur borgarar landsins hava

Tað er mín sannføring, at vit náa á mál, um vit venda gerðarloysi til virkisfýsni og konfrontatión til dialog...

# Til dystin fús!



Val X

EDMUND JOENSEN

**Tað skuldi verði mær ein stór gleði at umboða Føroyar eftir komandi fólkatingsval - sum tað sømir seg við spekt og sóma - bygt á tær royndir og tað netverk, sum skapt er gjøgnum 20 ára politiskt arbeiði millum føroyskar og danskar polittikarar. Til hetta arbeiði eri eg til dystin fús**

Føroyar hava brúk fyri, at ein sambandsrødd umboðandi landið komandi valskeið. Eitt fólkatingsumboð, sum hevur hjarta á røttum stað, og sum umboðar tann sakliga partin av føroyingum. Eitt fólkatingsumboð sum sær allar teir positivu møguleikarnar í samstarvinum.

Høvuðsuppgávan hjá einum sambandsumboði er sjálvandi fyrst og fremst tað politiska arbeiðið á fólkatingi - at virka í fólkatinginum, har alt ríkið, Danmark, Grønland og Føroyar, er umboða á líka føti.

Uppgávan er eisini at umboða føroyingar í Danmark, tey ungu undir útbúgving, tey sum eru har vegna sjúku, og teir føroyingar sum annars hava ørindi har.

Ein sera týdningarmikil og forsømd uppgáva er eisin at gera eitt upplýsandi arbeiði fyri at kunna danir um føroysk viðurskifti, bjóða seg fram til felagskapir, skúlar og onnur við sakligari upplýsing um Føroyar.

Tað skuldi glett meg at fingið loyvi til at virka fyri føroyskum viðurskiftum í ríkisfelagskapinum.

# Føroyar og ES



Val X

HELENA DAM Á NEYSTABØ
Javnaðarflokkurin

Danir fara um stutta tíð at samtykkja ein nýggjan ES-sáttmála. Hesin sáttmáli hevur verið borin saman við eina nýggja felags grundlóg fyri limalondini í ES, har danir eins og onnur fólk mugu geva sjálvsavgerðarrætt frá sær. Ein slíkur sáttmáli kann tí eisini viðføra, at felagsmál millum Føroyar og Danmark verða flutt til Bryssel.

Hetta er eitt álvarsmál fyri Føroyar, og fólkatingssessurin skal brúkast til at fyribyrgja, at føroyskur sjálsavgerðarættur verður avreiddur til Bruxelles. Ein føroyskur fólkatingslimur skal fylgja væl við, og arbeiða fyri at varðveita og menna ta serstøðu, sum vit hava í ríkinum og í Evropa.

Tí skal fólkatingslimurin vera á staðnum, har avgerðirnar verða tiknar.